*Edward Fuglø kannar forprentið av frímerkjunum væl og virðiliga, áðrenn prentingin verður góðkend*
*Mynd: Dávur Winther*





*Grafikarin á prentsmiðjuni takkar Edwardi fyri vitjanina*

*OSD prentsmiðjan hevur eini 200 ár á baki og er víðagitin*




# Góðkendu í Wi

**Føroyskt ferðalag við listarmanninum Edwardi Fuglø á odda hevur vitjað á kendari prentsmiðju í Wien, har eitt nýtt føroyskt frímerki skal prentast. Trygdin var í hásæti, og prentarar vóru spentir, um Edward fór at góðkenna teirra arbeiði**

FRÍMERKI
*Dávur Winther*

OSD ella Østerreichische Staatsdruckerei hevur meir enn 200 ár á baki sum ein týðandi prentsmiðja í Wien. Tá ið vit komu innar, skuldu vit lata passini frá okkum og skriva navnið á ein lepa og undirskriva rættferðarreglur, meðan vit vóru har.

OSD er millum annað góðkent til at kunna prenta pass og frímerkir.

Við einum trygdarvørði í hølunum, og eftir at verða slúsað gjøgnum jarnrulluportur, vóru vit innanfyri, har tað arbeiða meir enn hálvtannaðhundrað fólk.

Uppgávan var at góðkenna uppseting og forprent til eitt frímerkjaark, sum Postverk Føroya gevur úr, og í ferðalagnum vóru eisini Edward Fuglø, ið hevur teknað arkið, og Svanbjørg Manai, stjóri á Frímerkjadeildini.

Edward Fuglø er sera nærlagdur, og har skal einki verða at seta fingurin á, eftir at frímerkið er prentað.

Edward er kendur í frímerkjaheiminum sum verandi ikki hvør sum helst. Hann hevur gjørt hópin at frímerkjum, sum Postverk Føroya hevur givið út. Og tað eina árið var hansara frímerki